Fylgiskjal 4

HOYRINGSSKRIV

Til: Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið

Viðv.: Hoyringssvar til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) – Serliga viðvíkjandi § 22 og rættarstøðuna fyri fiskidagar og bankarættindi.

Dato: 02. Januar 2026

1. INNLEIÐING

Undirritaða felag, P/F EFHO, ið er ein etablerður aktørur í føroysku fiskivinnuni við skipum í Bólki 3 (línuskipi) og Bólki 4 (útróðrarbáti), hevur gjøgnumgingið uppskotið til broytingar í løgtingslóg um sjófeingi, dagfest 19-11-2025.

Tað er okkara greiða fatan, at uppskotið tykist at undirgrava grundleggjandi rættartrygdina í vinnuni, herundir lógarfesta langtíðar ræðisrættin á fiskirættindum tað, sum var grundarlagið í 1994 undir fiskivinnuni – forsøgnin (stabilir karmar)

Kjarnin í okkara mótmæli snúgva seg serliga um ætlaðu broytingarnar í § 22. Nú verður lagt upp til at fiskirættindi, nú kunnu verða stýrd og broytt við eini einfaldari fyrisitingarligari "fráboðan" ístaðin fyri við lóg ella kunngerð – tvs. uttan hoyringsfreistir.

Hetta er ikki bert ein broyting í umsitingarliga leistinum, men ein grundleggjandi broyting av rættarstøðuni - ræðisrættin yvir rættindum og stabilar karmar fyri framtíðar íløgum í vinnuni.

2. JURIDISK GREINING: "AT SKIPA FISKISKAPIN" VS. RÆTTINDAÚTLUTAN

Uppskotið leggur upp til at orða § 22, stk. 1 soleiðis: *"Landsstýrisfólkið kann skipa fiskiskapin í føroyskum sjógvi, undir hesum m.a. áseta skipan, **býti** og treytir um fiskiskapin. Ásettar føroyskar kvotur, heildarkvotur, felags árskvotur, felags fiskidagar o.tíl. kunnu lýsast við eini **fráboðan**."*

2.1. Misskiljing ella víðkan av "Heimild at skipa fiskiskapin" Meginreglan í fyrisitingarrætti er, at heimildir skulu tulkast avmarkandi, serstakliga tá talan er um inntriv í borgararættindi. Orðingin "at skipa fiskiskapin" fevnir í høvuðsheitum um tøkniliga regulering av fiskiskapi á fiskileiðini (Locos) áseting av meskastødd, friðing av ávísum økjum ella tíðarskeiðum, nýtslu av veiðiháttum o.tíl.

§ 22, stk. 1 var ein skipan, sum var ætlað at skipa fiskiskap eftir fiskastovnum ikki fevndir av § 18 og **ikki** ætlað sum eitt amboð til grundleggjandi at áseta ella broyta *býtið* av veiðirættindum millum bólkar ella einstakar aktørar. At inndraga veiðirættindi (fiskidagar/kvotur) frá einum eigara og geva til ein annan, ella at "nullstilla" rættindini uttan lógarheimild og endurgjald.

2.2. "Fráboðan" sum grundarlag fyri "býti" Trupulleikin liggur í, at uppskotið loyvir, at "býti og treytir um fiskiskapin" kunnu lýsast við eini "fráboðan", hvørji rættindi fevnir nýggja § 22, stk. 1 um, tað framgongur ikki.

- **Rættartrygd:** Ein "fráboðan" er ein fyrisitingarlig gerð, sum ikki krevur sama formliga tilgongd sum ein kunngerð (hoyring, grundgeving og almenna kunngerð) ella ein lóg (Løgtingsviðgerð). Hetta merkir, at grundleggjandi broytingar (m.a. í rættindum) við hesum kunnu fremjast skjótt, uttan viðgerð. Hetta ger rættarstøðuna ótrygga, sum ikki sømir seg einum rættarstati.

- **Flyting av valdi:** Valdið at stýra fiskivinnuni verður flutt frá einari demokratiskari tilgongd til eina reinari fyrisitingarliga avgerð, sum liggur hjá Landsstýrismanninum. Hetta undirgrevur maktarbýtið og minkar um eftirlit við stórum inntrivum í vinnuna.

2.3. Striking av § 22, stk. 2 – Upphæving av "Lex Specialis" fyri Føroya Banka Uppskotið leggur upp til at strika galdandi § 22, stk. 2, sum ásetir serstaka heimild til at skipa fiskiskapin eftir botnfiski á Føroya Banka. Henda grein hevur virkað sum ein "lex specialis" (serlóg) og hevur undirstrikað, at Fiskimálaráðið er bundið at fylgja eini serligari skipan fyri hetta øki.

- **Avleiðing:** Við at strika hesa serheimild, verður Føroya Banki "normaliseraður" og lagdur undir ta generellu heimildina í § 22, stk. 1 (sum tá eisini kann lýsa býti við fráboðan). Hetta sær út til at vera ein manøvra fyri at beina burtur tær løgfrøðiligu forðingar, sum hava havt til endamáls at verja tey søguligu rættindini á Bankanum Nú verður ómakasleysari hjá Landsstýrismanninum lættari býta og "umafturbýta".

3. KONTINUITETUR Í RÆTTINDUM Í FØROYSKARI FISKIVINNULÓGGÁVU (1994-2020)

Ein grundleggjandi og lógarásett meginregla (prinsipp) í føroyskari fiskivinnulóggávu síðani 1994 hevur verið , at ræðisrætturin á fiskirættindum **rættindini verður varðveittur uttan mun til um** lóggáva ella umsitingarskipanir broytast.

Lógin frá 1994 (Løgtingslóg nr. 28/1994 um vinnuligan fiskiskap): Tá fiskidagaskipanin avloysti kvotaskipanina. Løgtingsviðmerkingarnar (Lt. 1995, s. 521) *"Veiðiflotin verður samansettur sum higartil og bólkarnir varðveita sama procentpart av tilfeinginum sum higartil"*. Hetta er ein beinleiðis staðfesting av prinsippinum um varðveitslu av lutfalsligum rættindum.

- **Fiskivinnunýskipanin 2017 (Løgtingslóg nr. 161 frá 2017):** Hóast stórar broytingar við uppboðssølu fyri ávísar kvotur, varð framhaldandi tikið atlit til søguliga luttøku fyri heimafiskiskapin og teir ymsu bólkarnar.
- **Sjófeingislógin 2019 (Løgtingslóg nr. 152 frá 2019):** Henda lóg varð bygd á grundarlagið í undanfarnu lógum, har tey søguligu rættindini framhaldandi vóru vird og flutt í sama lutfallið til teir ymsu skipabólkarnar.

Hetta vísir, at tað hevur verið *viljin hjá Løgtinginum* at tryggja, at aktørur ikki verða verri stillaðir – varðveita sín lutfalsliga part av atgongdin til livandi fiskatilfeingi – uttan mun til um lóggávan ella umsitingarskipanir broytast. Nýggja uppskotið um at innføra "fráboðan" sum grundarlag eisini "býti" ger beinleiðis inntriv í hetta grundleggjandi prinsipp, og skapar grundarlag fyri at **nullstilla** tey lutfalsligu rættindini.

4. SØGULIG RÆTTINDI OG OGNARVERJA – HJÁ P/F EFHO

Felagið, P/F EFHO, hevur keypt rættindi (fiskidagar) í dýrum dómum.

- **Keyp av døgum:** Felagið hevur keypt fiskidagar frá aktørum í Bólki 4 og flutt teir til skip í Bólki 3. Hesi keyp eru farin fram í samsvar við galdandi reglur og eru skrásett og góðkend av Vørn. Hesi eru dokumentera og vísa at ræðisrætturin á rættindunum er fluttur.
- **Fiskirættindi sum langtíðar brúksrættindi:** Hesi keyptu rættindi eru nú ogn hjá P/F EFHO. Um Fiskimálaráðið nú við eini "fráboðan" sambært nýggju § 22, stk. 1, velur at "umafturbýta" hesi rættindini t.d. á Føroya Banka, uttan at viðurkenna og taka fulla hædd fyri hesum, so er talan um **beinleiðis inntriv í ræðisrættin yvir rættindi, sum er at samanbera við ognartøku**. Eitt slíkt inntriv, uttan greiða lógarheimild stríðir ímóti Grundlógini § 73.
- **Argument um "ikki-nýtslu":** Tá FMR nýtir grundgevingar um, at rættindi eru "dottin burtur" vegna ikki-nýtslu (t.d. á Føroya Banka), verður tað víst á, at hetta ikki heldur juridiskt. Fiskiskapurin varð steðgaður fyrisitingarliga í kunngerð vegna lívfrøði. At revsa aktørar – inndraga hesi rættindi - fyri at fylgja einum myndugleikaboði er í stríð við grundleggjandi fyrisitingarrættarlig prinsipp.

5. NIÐURSTØÐA

Við støði í frammanfyri greinaðu viðurskiftum, heita vit staðiliga á Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið um at taka hesar viðmerkingar til eftirtektar og gera neyðugu broytingarnar í lógaruppskotinum:

1. **Strikingin av § 22, stk. 2 skal takast aftur:** Serheimildin fyri Føroya Banka skal varðveitast fyri at tryggja rættarstøðuna og tey søguligu bólkarættindini í hesum serstaka øki. At strika hesa grein uttan nakra hóskandi juridiska grundgeving er eitt beinleiðis álop á etableraðu fiskirættindi sum langtíðar brúksrættindi.

2. **"Fráboðan" til "býti" skal takast úr § 22, stk. 1:** Orðingin "kunnu lýsast við eini fráboðan" skal strikast, tá talan er um "býti og treytir um fiskiskapin". Býti av veiðirættindum er eitt so grundleggjandi inntriv í ognarrættin, at tað krevur lóg ella í minsta lagi eina formliga kunngerð eftir almennum fyrisitingarrættarligum meginreglum (m.a. hoyringsskriv og grundgeving).

3. **Virkisøkið av "at skipa fiskiskapin" má nágreinast:** Tað má klárt framganga, at heimildin "at skipa fiskiskapin" í § 22, stk. 1 ikki gevur Landsstýrismanninum heimild til at fremja grundleggjandi umbýti av veiðirættindum millum bólkar ella aktørar, uttan so at hetta er klárt og týðiliga heimilað í lógini við fullari rættarverju.

4. **Varðveitslan av keyptum og søguligum rættindum:** Tað skal staðfestast í lógini ella viðmerkingunum, at allir fiskidagar (bæði teir vanligu fiskidagarnir og bankadagar), ið lógliga eru keyptir og fluttir millum bólkar og aktørar, verða viðurkendir sum brúksrættindi hjá keypara í øllum framtíðar reguleringum og býti. Tey lutfalsligu rættindini skulu verða vird.

P/F EFHO heitir á Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið um at taka hetta til eftirtektar og harvið tryggja, at føroyska fiskivinnan framhaldandi kann virka undir tryggum kørmum. Eitt stabilt lógarumhvørvi er grundarlagið og fyritreytin undir allari vinnuligari menning í fiskivinnuni.

Vinarliga,

P/F EFHO

Óli M. Lassen, stjóri